## Neistin fingið byggiloyvið

Neistin skrivar á heimasíðu síni, at Tórshavnar kommuna hevur givið felagnum byggiloyvið til nýggju høllina við Landavegin. Í fyrsta umfari er talan um eitt útgravingarloyvi, so Neistin kann gera økið byggiklárt. Nú fer ein bólkur frá felagnum at viðgera tilboð, meðan øll loyvi í samband við høllina skulu fáast í lag. Talan er um brunaloyvi og onnur loyvi, sum krevjast til tessa at fáa endaligt byggiloyvi.




## Hesir umboða Føroyar

Tað er nú greitt, hvørjir verða við á føroyska liðnum, sum í annað kvøld skal spæla móti Liverpool Legends á Tórsvølli. Teir, ið umboða Føroyar verða hesir: Jens Martin Knudsen, Kaj Leo Johannesen, Abraham Løkin, Jóannes Jacobsen, Kári Reynheim, Eyðfinn Lamhauge, Eirikur Rasmussen, Kristian Petersen, Jógvan Martin Olsen, Mikkjal Danielsen, Ásmund Nolsøe, Henrik Thomsen, Hans Leo í Bartalstovu, Jens Kristian Hansen, Gunnar Mohr, Jan Dam, Magni Jarnskor og Óli Johannesen.

# Føroyadagur á Game Street



Ein partur av oyggjaleikatilbúgvingini hjá álendsku vertunum er sonevnda Game Street. Í miðbýnum í Mariehamn er stórt øki avlagt til oyggjaleikir, og við matsølubúðum, undirhaldi, livandi tónleiki og diskoteki verður syrgt fyri, at gestirnir altíð kunnu finna sær onkra dagdvølju, um hugurin er til tað.

Hóskvøldið yvirtóku føroyingar tó Game Street. Guðrun Gudmundsen, sum býr í Álandi, og sum er guide hjá føroyska ferðalagnum á ferðini, tók stig til at savna eina rúgvu av føroysku luttakarunum, og umvegis SMS-boð varð boðskapurin skjótt sendur runt Áland.

Klokkan 21 yvirtóku føroyingarnir so ein part av Game Street, og so var føroyskur dansur, felagssangur og annars bara hugni á skránni næstu góðu løtuna.

Myndamaður okkara, Álvur Haraldsen, legði leiðina framvið, og vit læta bara myndirnar tala fyri seg.

*-mørk*





